# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Dundurtala

Formaður Tjóðveldisins hevur lagt fram formansfrágreiðing á flokstingi við Gjógv, og røðan er bæði háfloygd og visjoner, eitt nú við at formaðurin ger eina veruliga seriøsa roynd at útgreina, hvat altjóðgerðin ber við sær av avbjóðingum og vandum fyri eitt land sum Føroyar. Hann nemur eisini við tann stóra spurningin um infrakervið og spurningin um sambandið millum Føroyar og útheimin, sum m.a. skal tryggja, at vit ikki gerast útjaðari í altjóðagjørdum heimi. Hetta er alt áhugavert ikki minst tí, at varaløgmaður nýtir høvið at tykta teir samgongulimir, sum ikki makka rætt og loyalt fylgja samgongukós. Varaløgmaður leggur ikki fingrarnar ímillum og nevnir afturvendandi hóttanir og revolvarapolitikkur frá einstøkum samgongulimum og leggur hann teir, sum sum virka fyri egnum hjartamálum við forsíðum og innsløgum í bløðunum, undir at máa alt álit undan stjórnarsamstarvinum.

Móttakararnir av hesari breiðsíðu eru ivaleyst Páll á Reynatúgvu og Gerhard Lognberg. Teir hava gjørt Sandoyartunnilin til hjartamálið. Formaðurin hjá Tjóðveldi og Føroya varaløgmaður setur sostatt samgonguna uppá spæl í síni formansfrágreiðing. Hetta hevur sjálvsagt alt nakað at gera við, tað, sum hann í røðu síni sigur um fíggjar- og búskaparviðurskiftini og samfelagsligar raðfestingar. Hetta er væl skiljandi, tí her er nógv, sum skal hanga saman: blokkniðurskurður, skúlabyggingar, Skálafjarðartunnilin, útbygging av flogvøllinum og hartil herímillum fleiri mál, sum flokkur formansins hevur ábyrgdina av og sum mugu loysast eftir eini fastlagdari ætlan, um nøkur vón skal vera um gott úrslit av fólkaatkvøðuni, sum verður longu um tvey ár.

Tað kann tó undra, at formaðurin fer so harðliga út móti Gerhardi og Pálli, og tað undrar ikki minni, at tað er varaløgmaður og ikki løgmaður, sum reiggjar koyrilin. Tað liggur millum reglurnar, at makka teir ikki rætt, verður Sjálvstýrisflokkurin tikin inn og teir ólýdnu kunnu sigla teirra egna sjógv. Men so er spurningurin um ein slík samanseting fer at gera parlamentarisku støðuna lættari. Man Kári Højgaard ikki fara at standa eina fast uppá Skálafjarðartunnilin sum Páll og Gerhard halda fast um Sandoyartunnilin? Tað er tí ein spurningur, hvørt hesar móthóttanir eru gagnligar fyri samgonguna og hennara politikk. Hevði tað ikki verið skilabetri at fingið ein dialog við Páll og Gerhard heldur enn at hótta, og fáa hendan dialogin í sambandi við eina samlaða útbyggingarætlan fyri øll tey stóru og tungu økini so sum infrakervi, skúlar, mentanarhús, flogvøll o.m.a. Í hesum sambandi kundu mong ivaleyst hugsað sær at vita, hvørja viðmerkingar landsins løgmaður hevur ella um varaløgmaður, talar vegna løgmann eisini í hesum máli.

**Sosialurin**

## Krabbamein elvt av HPV virus drepur fleiri enn 500.000 menniskju árliga!

JJENIS AV RANA



**- ein viðmerking til umrøðu Dimmalættingar mikudagin av nýggju koppsetingarætlanunum móti HPV virus**

Í ársfrágreiðing Landslæknans seinastu trý árini yvir deyðsorsøkir, dominerar talið av "kræft i andre og uspecificerede lokalitater"! Hvussu nógv av hesum doyðu av kreftformum, ið verða elvdir av HPV virus, fáa vit tíverri ikki at vita. Hinvegin sæst úr sama yvirliti, at hesi trý árini vóru 14 aðrir deyðstilburðir, har orsøkin kann hava verið krabbi elvdur av hesum sama virusi.

Í tíðarskeiðinum 1996 til 2003 síggjast deyðssporini týðuligari. Tá verða 15 føroyskar kvinnur sagdar deyðar av krabba í lívmóðurhálsi, men eisini her er talið í "andre og uspecificerede lokaliteter" ovurhonds stórt og ikki nágreinað. Harumframt doyðu hesi ár 29 av krabbaformum, hvørs høvuðsorsøk kann hava verið HPV infektión!

Í Danmark doyggja árliga 175 kvinnur av undirlívskrabba, sum skuldast HPV virus.

Um allan heim verður tal teirra, ið doyggja av krabba vegna HPV virusið, mett at verða 500.000 árliga.

Vón mín er, at vaccinatiónirnar kunnu byrja sum skjótast, og at hesar, saman við kyknukanningunum, um nøkur ártíggjur hava bast hesum drepara, sum rakar so mong heim, her og alheims.

Nevnast kann, at talan er um at koppseta tríggjar ferðir innan eitt hálvt árog møguliga einaferð seinni. Koppsett verður um 12 ára aldur, og virknaðurin verður væntaður so góður, at ikki verður mett neyðugt at koppseta dreingir.

## Viðmerking til frídømingina av Tórbirni Jacobsen

ÓLAVUR PETERSEN

At Eik banki hevur noktað Kongshavnar Útgerðarfelag pant í partabrøvum, áljóðandi 1 mió. kr má hava sína einføldu orsøk í, at Kongshavnar Útgerðarfelag ongan livandi tjans hevur havt til rakstur av felagnum. Sjálvt um alt týddi í sól og mánað uppá, at virði upp á eina mió. skjótt varð til tað dupulta í virði.

Álvaratos! Napolen hevði neyvan klárað at bunkrað til fiskiskap á fjarlagdari fiskileið fyri hesa upphædd.

Frágreiðingin hjá løgmanni hevur stór lýtir. Millum annað um privatpersónurin Tórbjørn Jacobsen hevur loyvi til at taka framleiðslutól (M/S Napoleon) úr P/F Kongshavnar Útgerðarfelag, at vera í vinnu fyri privatpersónin Tórbjørn Jacobsen.

Loyvir partafelagslógin ánarum tess at ogna sær virðir úr partafelagnum, tá hugsað verður um tær lukrativu sømdir, sum sama lóg ásetur, og sum Kongshavnar Útgerðarfelag eisini hevur notið gott av.

Er tað virðisgrundarlagið sum Eik banki arbeiðir eftir, sum er orsøkin til at Kongshavnar Útgerðarfelag ikki fekk pant í virðisbrøvum (stórt aktiv hjá felagnum), - einum felag, sum hevur átikið sær stórar skyldur yvir fyri føroyska landskassanum, so er tað at frøast yvir.

Løgmaður og embætismannaverki eru nú í størri trupuleikum enn Tórbjørn.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.